Tjaldur-VÍF 11-37 (4-14)

# VÍF koyrir víðari

**Tjaldur kundi als ikki geva VÍF nakra mótstøðu, hóast oddaliðið at kalla ongan skiftisleikari hevði við á ferðini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var ikki tað stóra ivamálið um, hvat lið skuldi vinna, tá VÍF kvinnurnar vitjaðu í Runavík sunnudagin. Talan var um oddalið móti botnliðið, og hesin kaldi veruleikin sást eisini aftur á máltalvuni, tá dysturin var lokin.

26 mál skildu partarnar, og hóast hetta helst er hugaligt hjá vestmannagentunum, so er helst minni hugaligt, at onkrir av leikarunum nú byrja at fella frá, orsakað av skaðum.

Ein av skøddu gentunum er Nicolina Eyðbjørnsdóttir, sum veruliga hevur togað seg upp á føroysku hondbóltstindarnar í ár. Sunnudagin sat hon á beinkinum og hugdi, og sjálvsagt kundi hon ikki annað enn lata væl at úrslitinum.

– Tað gekk eitt sindur tungt hjá okkum í byrjanini, men tá so Ioana fekk nøkur skot inn, kom líka sum glið á, og tað var ongantíð ivamál um, at vit fóru at vinna dysitn.

Víðari segði Nicolina, at tað serliga var Nicoleta, sum spældi ein góðan dyst, men at spælið sum heild eisini gekk væl.

Sum nevnt, so sat Nicolina sjálv á beinkinum, meðan dysturin varð spældur, og tað sama kann næstan sigast um Sóleyð Mikkelsen, sum í ár hevur verið hollur stuðul á VÍF liðnum. Hon hevur fingið nakað av vatni í knæið, men hesa ferð var hon somikið birg, at hon kundi hjálpa liðfeløgunum seinastu løtuna.

Um útlitini fyri at skaddu leikararni kunnu vera við mikukvøldið, tá seinna hálvfinalan í Coca-Cola kappingini stendur á skránni, er Nicolina heldur ivasom.

– Eg veit ikki rættiliga, hvussu stendur til við fótinum. Hann er koyktur nóg so illa, men møguliga kann hann tapast upp, so eg fái spælt. Hjá Sóleyð sær heldur betri út. Hon segði seg vera klára í dag, men hon spældi tó lítið við.

– Tað er tó greitt, at vit mugu hava meira enn seks útileikarar við, tá vit fara til Havnar, so tað er bara at vóna, at skaðarnir skjótt koma í rættlag aftur, sigur Nicolina at enda.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Tjaldur: Melitza Ergic 5(2), Mona Langgaard 2(1), Beinta Joensen 2, Oddvá Fossdalsá 1(1), Kristine Ellingsgaard 1
VÍF: Nicoleta Radu 12, Ioana Rápa 11(3), Jacklin Durhuus 5, Fríða Marjunardóttiir 3, Randi Kúrberg 3, Sóleyð Mikkelsen 2(2)
Brotskøst: Tjaldur 5, VÍF 6
Útvísingar: Tjaldur 3, VÍF 4
Dómarar úr StÍF: Justines Justinussen og Pole Hansen



*Nicolina Eyðbjørnsdóttir er í løtuni úti við skaða, men sjálv vónar hon at verða til reiðar at tørna út nakað skjótt*

Tjaldur-VÍF 20-28 (11-13)

# Tungt at savna seg

**Millum landsliðsuppgávur og hálvfinalur høvdu VÍF leikararnir trupult at savna tankarnar um dystin móti Tjaldrinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ein gylt regla í øllum ítróttahøpi er, at tú ongantíð skalt undirmeta mótstøðuna. Ivaleyst eru VÍF leikararnir á besta manslið-inum í landinum helst eisini greiðir um hetta, men kortini, so var nær við, at teir júst framdu hetta mistakið sunnudagin.

### Fylgdust í ein hálvleik

Mótstøðuliðið var Tjaldur, sum á pappírinum ikki skuldi kunna gjørt tað stóra við Vestmenningarnar, sum hava verið fullkomuliga einaráðandi higartil í kappingini.

Fyrra hálvleik av dystinum sunnudagin sást tó lítið til hetta, og tað eydnaðist ongantíð gestunum at skræða seg leysan av væl stríðandi heimaliðnum. Beint eftir steðgin gekk tó betri, og tá vestmenningar fyrst høvdu vunnið seg nøkur mál framum, so var alt avgjørt.

Eftir dystin helt VÍF-venjarin, Hjalmar Klein Olsen, at orsøkin til, at tað gekk so striltið, fyrst og fremst var hugburðurin hjá leikarunum.

– Vit tosaðu um hetta áðrenn dystin, men kortini, so tóktust leikararni slettis ikki at vera kláriri til uppgávuna fyrstu løtuna. Fleiri hava verið við í landsliðshópinum herfyri, og harumframt er eisini hálvfinala og annað í tonkunum, so tað er ikki so lætt at seta seg upp til ein slíkan dyst, greiðir Hjalmar frá.

– Í hálvleikinum tosaðu vit so aftur saman, og tað eydnaðist okkum eisini at avgera dystin beinanvegin, sum seinni hálvleikur byrjaði. Serliga var tað í verjupartinum, at tað riggaði væl hjá okkum her, og vit fingu fleiri skjót kontramál. Hesa løtuna vístu leikararnir, at teir veruliga vildu vinna dystin, og tað eydnaðist okkum tíbetur eisini, segði Hjalmar at enda.

### Hvør fær steðgað teimum

Sostatt trumlar VÍF framvegis víðari við fullum stigatali, og tað kann í løtuni tykjast ilt at gita, hvør skal kunna steðga teimum. Kyndil tók stig frá teimum í grundspælinum, og gera tað møguliga aftur, men hinvegin er hetta neyvan nóg mikið til at finna seg upp um VÍF á stigatalvuni.

Til hetta hava kappingarneytarnir sett ov nógv stig til, meðan maskinan hjá vestmenningum hevur havt at kalla fulla ferð á alla tíðina, og helst eisnii fer at koyra við somu ferð tað, sum eftir er av kappingarárinum.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Tjaldur: Sverri Justinussen 6(2), Mortan Hansen 5, Zoran Sarcevic 3(2), Arnfinn Langgaard 2, Tummas Magnussen 1
VÍF: Áki Olsen 7, Ingi Olsen 6(3), Agnar Joensen 6, John Zachariassen 3, Danut Negro 2, Rógvi Nielsen 1, Harald Bjørgvin 1, Sjúrður Holm 1, Petur Fr. Joensen 1
Brotskøst: Tjaldur 5, VÍF 4
Útvísingar: Tjaldur 3, VÍF 2
Dómarar úr StÍF: Justines Jusinussen og Pole Hansen

VB-Stjørnan 32-27 (19-10)

# VB vann og iðraði seg

**Hóast glaðar um tryggan fimm mála sigur, so mundu VB kvinnurnar iðra seg um, at tær ikki skúgvaðu allan iva til viks í fyrru hálvfinaluni móti Stjørnuni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Spenningurin var stórur í Vági, tá VB og Stjørnan enn einaferð settu hvørjum øðrum stevnu í Ítróttahøllini í Vági. Fyrra hálvfinalan í steypakappingini stóð á skránni, og fá mundu ivast í, at talan fór at gerast um ein bæði spennandi og undirhaldandi dyst.

Uppgerðirnar, sum liðini áður hava havt sínamillum, hava greitt víst, at liðini hóska væl til hvørt annað, og at talan tí nærum hvørja ferð gerst um ein góðan hondbóltsdyst.

### VB leyp avstað

Hesa ferð var tó líkt til, at VB als ikki ætlaði, at talan skuldi gerast um nakran dyst.

Eftir at liðini soleiðis høvdu hildið hvørt annað í skinninum fyrstu løtuna, leyp VB brádliga avstað, og áðrenn nakkar rættiliga vardi, høvdu tær á heimaliðnum lagt seg heili 10 mál framum.

Fyrst og fremst grundað á gott verjuspæl, sum eisini viðførdi fleiri skjótálop tóktist VB nú at hava fullkomuligt tamarhald á dystinum, og í seinna hálvleiki var eisini líkt til, at tað skuldi eydnast at halda fast um tryggu leiðsluna.

### Mansverja gav úrslit

Tá góðir 10 minuttir vóru eftir at spæla, valdi Stjørnan at fara út at mansverja bæði Reginu Radó og Andreu Lütz, og tað tóktist eisini greitt, at hetta fór at geva bonus.

Gaman í høvdu tær ikki møguleika at røkka einum sigri, men í øllum førum hava tær nú enn møguleikan at gera alt av á heimavølli, tá VB kemur á vitjan komandi vikuskifti. Tað høvdu tær neyvan havt, um munurin hevði verið 10 mál ella meira.

Tað var eisini ein hampuliga glaður Stjørnu-venjari, sum vit tosaðu við, tá klaksvíkingarnir aftur vóru á veg norður.

– Í fyrsta hálvleiki bar at kalla einki til hjá okkum, meðan tær spældur væl, og ta løtuna sá út til, at talan fór at gerast um eitt rættiliga skrædl. Tíbetur eydnaðist tað okkum at avmarka tapið, og fimm mál eru hóast alt ikki ógjørlig at vinna innaftur, tá vit spæla returdystin í Klaksvík, segði Rógvi Nielsen eftir dystin.

Vóru tey úr Klaksvík glað um hetta, so vóru boðini tey somu – tó við øvugtum forteknum – tá vit tosaðu við Eyðbritt Krosslá úr VB.

– Høvdu vit ikki mist so nógv í seinastuni, so høvdu vit at kalla tryggjað okkum finalusessin. Nú er munurin bert fimm mál, og ´tá vit eisini eru hart raktar av skaðum, kann tað gerast trupult hjá okkum.

Skaðarnir, sum Eyðbritt sipar til eru tær báðar, Rannvá augustinussen og Sólrun Krosslá, sum báðar hava brotið armin. Harumframt noyðist VB eisini at vera Gurið Mortensen fyri uttan, tá spælast skal í Klaksvík, við tað at hon fekk reytt kort, tá liðini aftur hittust sunnudagin.

Talan kann tí gerast um ein sera spennandi dyst í Klaksvík. Ein dyst, har Stjørnan skal vinna so nógv sum gjørligt, meðan tær í VB helst fara at leggja doyðin á at halda fast, soleiðis at liðið annað árið á rað kann gerast partur í steypafinaluni.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VB: Gurið Mortensen 8(2), Regina Radó 8(1), Christina Holm 5, Andrea Lütz 4, Leila Jespersen 4, Mary Krosslá 2, Eyðbritt Krosslá 1
Stjørnan: Vesna Tomajek 8(5), Annika Ljósstein 7(2), Sólvá Eystberg 3(1), Bára Skaale 2, Joan M. Joensen 2(1), Anna K. Samson 2, Una Olsen 2, Gunvør Høgnesen 1
Brotskøst: VB 5, Stjørnan 12
Útvísingar: VB 8, Stjørnan 4
Dómarar úr Tjaldri: Kári Hansen og Dánjal Hansen.



VB-Stjørnan 25-26 (10-10)

# VB søplaði gullvónina burtur

**Tvey misnýtt brotskøst og ein miseydnað yvirtalsstøða vóru viðvirkandi til, at VB í seinasta minuttinum mátti síggja Stjørnuna fara norður aftur við tveimum stigum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Dramatikkurin var í hásætinum, tá VB og Stjørnan annan dagin á rað hittust í Ítróttahøllini í Vági.

Dagin fyri høvdu liðini spælt fyrru hálvfinaluna í Coca-Cola kappingini, og tryggi VB-sigurin í hesum dystinum mundi helst hava við sær, at mongu heimaáskoðararnir høvdu góðar vónir undan landskappingardystinum. Ein dystur, sum var av avgerandi týdningi fyri bæði liðini. Fyri VB, tí hetta var teirra møguleiki at halda fast um takið á VÍF, meðan Stjørnan longu hevði mist hetta tak, men hinvegin skuldi ansa sær, soleiðis at tær ikki fóru longur frá teimum báðum fremstu.

### Javnt alla tíðina

Tryggi VB-sigurin í leygardagsdystinum varð millum annað grundaður á eina framúr byrjan, her VB veruliga leyp frá Stjørnuni, men hetta varð so av ongum sunnudagin. Heldur var tað hesaferð Stjørnan, sum fekk betru byrjanini, og sum skilst, so var ein av orsøkunum til hetta, at Rannvá Andreasen í málinum rættiliga var komin fyri seg, eftir at hon hevði havt ein heldur lakan dyst leygardagin.

Stjørnan megnaði at toga seg trý mál fram um gestirnar, men undan steðginum fekk VB svara aftur, og støðan var tí javnleikur, tá farið varð til hálvleiks. Annars er merkisvert, hvussu fá mál komu í fyrra hálvleiki. Ikki minst, tá hugsað verður um, at liðini bæði aloftast eru partur í málríkum uppgerðum, men málverjarnir mundu vera størsta orsøkin til, at tað ikki varð soeliðis hesaferð.

Seinna umfarið var tað VB, sum byrjaði betri. Tær fóru eitt og tvey mál fram um, og hóast Stjørnan alla tíðina megnaði at hanga í, so var tað tó líkt til, at VB sigurin skuldi gerast veruleiki. Hvørja ferð Stjørnan gjørdi ein vørr, megnaði heimaliðið at svara aftur.

### Mistu trumfin

Í eini roynd at venda gongdini fóru klaksvíksgenturnar út at mansverja bæði Reginu Radó og Andreu Lütz, og hóast hetta ørkymlaði mótstøðuna, so megnaði VB tó alla tíðina at svara aftur.

VB leiðslan var eitt mál, tá tær tríggjar minuttir undan leikloki fingu ein rættan trumf í hondina. Vesna Tomajek fekk tveir fingrar frá dómarunum, og tá VB samstundis átti brotskast, var greitt, at nú kundu tær avgera. Brotskastið varð misnýtt, men tá VB kortini fekk mál, sá út til, at stigini skuldu hanga eftir har suðuri.

Sama støða endurtók seg løtu seinni, tá Stjørnan aftur hevði minkað niður í eitt mál. Hesa ferð varð brotskastið tó misnýtt, og við ístaðin fekk Stjørnan brotskast hinumegin, og við 20 sekundum eftir at leika sendi vágsgentan í Klaksvík, Sólvá Eystberg, bóltin í netið og Stjørnuna upp á javnt.

VB fór síðani í tað, sum ætlandi skuldi verða seinasta álopið í dystinum, men onkursvegna mistu tær bóltin, og so kundi Stjørnan fara í kontra. Vesna Radovic rann undan Gurið Mortensen niðan móti VB málinum, men tá hon skuldi skjóta, varð hon harðliga tikin av Gurið. Bólturin fór tó netið, men dómararparið bríkslaði fyri brotskasti og reyðum korti til Gurið.

Enn einaferð varð Sólvá sett at skjóta, og meðan hinar vóru lidnar við sín leiklut, vann hon seinasta tvídystin við Gurðun í Lágabø, og tryggjaði harvið, at bæði stigini fyri dystin fóru norður ti Klaksvíkar.

### Vónbrotnar

At kalla VB kvinnurnar fyri vónbrotnar man vera ein av teimum heilt stóru undirmetingunum higartil í ár, og tá vit sunnukvøldið fingu orðið á Eyðbritt Krosslá, var hetta eisini púra greitt.

– Eg veit ikki hvat tað var, sum hendi, men har rapaði bara alt hjá okkum seinastu løtuna. Vit megna ikki at spæla okkara spæl, tá vit spæla fýra móti fýra, og vit lova teimum ferð eftir ferð í kontra, tí vit missa lættar bóltar í álopspartinum.

– Vit hava tí bert okkum sjálvum at takka, at vit ikki vunnu dystihn, tí serliga í byrjanini av dystinum høvdu vit allar møguleikar at leggja okkum framum, men Rannvá stóð ein sera góðan dyst í málinum. Tað gjørdi Guðrun tó eisini fyri okkum, so kanska vigaði hetta upp ímóti hvørjum øðrum.

– Alt í alt haldi eg tó, at talan var um ein ótrúliga góðan dyst fyri áskoðararnar, men tíverri blakaðu vit so alt burtur seinastu løtuna, segði Eyðbritt Krosslá at enda.

### Heoni skal finnast

Onkur av áskoðarunum vil helst vera við, at Stjørnan fram ímóti endanum vóru ótrúliga hepnar, og venjari teirra var heldur ikki ósamdur í hesum.

– Tað er so einki at tosa um, at tað skal hepni til, fyri at vinna soleiðis, men hinvegin kemur hepni ikki av sær sjálvum. Tað skal arbeiðast fyri tí, og okkara leikarar royndu alla tíðina at stríðast, sjálvt um tað til tíðir sá meira enn svart út hjá okkum, sigur Rógvi Neilsen.

Hann duldi heldur ikki fyri, at tað kendist sum ein lætti at vinna, nú liðið at kalla bara hevur tapt seinastu dystirnar.

- Í landskappingin mugu vit nú vóna, at onnur lið kunnu hjálpa okkum, men vit hava enn møguleikan í steypakappingini. VB verður ógvuliga skert, nú hvørki Rannvá, Sólrun ella Gurið vera á liðnum í seinnu hálvfinaluni, og eg haldi tað ikki vera ógjørligt, at vit kunnu vinna við meira enn fimm málum á heimavølli, segði ein ovurfegin Stjørnu venjari at enda.



*Takka verið tveimum brotskøstum frá Sólvá Eyustbeg eydnaðist tað í seinasta minuttinum hjá Stjørnuni at vinna seg fram um VB*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VB: Andrea Lütz 9(2), Regina Radó 8, Gurið Mortensen 3(1), Christina Holm 3, Eyðbritt Krosslá 1, Mary Krosslá 1
Stjørnan: Sólvá Eystberg 6(6), Anna K. Samson 6, Annika Ljósstein 5, Vesna Tomajek 3, Bára Skaale 2, Joan M. Joensen 2
Una Olsen 2
Brotskøst: VB 7, Stjørnan 6
Útvísingar: VB 1, Stjørnan 3
Diskvalifikatión: VB 1 (beinleiðis reytt)
Dómarar úr Tjaldri: Dánial Hansen og Kári Hansen

KÍF-StÍF 23-27 (14-11)

# Strandingar vóru kroystir

**Kollfirðingar høvdu takið á strandingum í 50 minuttir, men máttu at enda geva skarvin yvir**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað man hava kenst heldur striltið hjá at spæla hondbólt hetta kappingarárið, har teir alla alla tíðina hava verið partur av botnstríðnum í bestu mansdeildini.

Ikki tí at leikluturin er teimum so ókendur, men heldur tí teir ivaleyst halda seg eiga eina betri lagnu uppiborna. Í nógvum av dystnum móti sterkaru liðunum hevur tað verið nær við og beint við síðuna av, men so at siga hvørja ferð hava teir mist móti endanum.

### Hildu í 50 minuttir

Soleiðis var eisini hjá teimum sunnudagin. Áðrenn strandingar høvdu varnast, at teir nú skuldu royna at spæla ein hondbóltsdyst, høvdu kollfirðingar skotið seg fram um, og hesa leiðslu hildu teir fast við allan hálvleikin.

Seiunna umfarið helt góða gongdin við, og fleiri mundu helst trúgva, at tað hesa ferð skuldi eydnast kollfirðingunum at koppa einum av teimum stóru.

Einnan tríggjar minuttir seint í dystinum var alt hetta koppað á høvdið. Meðan kollfirðingar vórðu raktir av eini útvísing, struku gestirnir avstað, og tá teir fyrst høvdu vunnið seg fram um, megnaðu teir eisini at halda fast um leiðsluna.

### Hekk ikki saman

Eftir dystin fingu vit orðið á John Petersen, sum aftur í vetur gevur StÍF eina hjálpandi hond, og hann var skjótur at ásanna, at talan var um tvey góð stig at fáa, men at dysturin sum so ikki var nakað serligt.

– Hatta var ein stakringur dystur frá okkara síðu, og vit fingu so at siga einki at hanga saman. Tíbetur fáa vit nøkur skjótálop móti endanum, soleiðis at dysturin koppar til okkum,

– Undir øllum umstøðum var stórur munur á hesum dystinum og so dystinum móti Neistanum mikudagin, sigur John, sum eisini ásannar, at tað kansak júst eru steypadystirnir, sum vóru orsøk til laka spælið sunnudagin.

Stigini fingu strandingar tó heim við sær, og um ikki annað kunnu teir fegnast um, at tað eisini eydnast at fáa stig, tá spælið kanska ikki akkurát er til tess.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
KÍF: Dorica Tomic 8(3), Ilija Topic 8, Petur Martin Poulsen 5, Petur Martin Johansen 1, Jákup Dam 1
StÍF: Artur Johansen 7(4), John Petersen 5, Marius Joensen 5, Kristian Petursson 4, Jón Rasmussen 2, Costin Dumitrescu 2, Alexandur Johansen 1, Andre Danielsen 1
Brotskøst: KÍF 3, StÍF 4
Útvísingar: KÍF 6, StÍF 3
Dómarar úr H71/Kyndli: Petur S. Dahl og Gunnar Gregoriussen